


www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 10 - 2012

# Ísland leggur seinastu hond á leitilovyi

Nú gongur tað skjótt við íslendsku útbjóðingini til oljuleiting. Almenni íslendski orkumyndugleikin hevur nú biðið umhvørvis- og fiskivinnumyndugleikarnar um viðmerkingar til tey tilmæli, sum ætlanin er at koma alment fram við í næstum, nevniliga hvørji feløg fáa hvørji leitiloyvi. Millum feløgini, sum søkt hava um leitiloyvi í Íslandi, er eisini tað føroyska Faroe Petroleum. Eisini eru íslendsk oljufeløg umframt eitt norskt felag. Orkumyndugleikarnir hava annars brúkt nógva tíð til at gjøgnumganga tøkniliga og jarðfrøðiliga partin av umsóknunum. Eisini hava myndugleikarnir kunnað seg um fíggjarligu orkuna hjá umsøkjarunum, í hvønn mun teir megna at halda fram við virksemi uppá longri sikt. Eisini hava umsøkjararnir fingið uppskot til loyvisreglar og skulu gera viðmerkingar til hesar innan tvær vikur. Ætlanin hjá myndugleikunum er, at øll viðgerðin av umsóknunum skal vera liðug móti endanum av november. Tað merkir, at umsøkjararnir fáa svar frá myndugleikunum fyrst í desember. Norski staturin hevur eisini rætt til at vera lutvísur partur av leitiloyvunum sambært avtalu millum Ísland og Noreg, sum fevnir um økið við Jan Mayen. Hetta er aðru ferð, at Ísland roynir seg við eini útbjóðing. Tann fyrra royndin miseydnaðist m.a. tí, at karmarnir, sum myndugleikarnir høvdu at bjóða oljufeløgunum ikki vóru nøktandi. Eftir tað hava myndugleikarnir broytt umrøddu karmar, og hetta hevði við sær, at nøkur oljusamtøk buðu upp á leitiloyvini. Tað hevur ljóðað, at føroyska oljufelagið Faroe Petroleum skuldi havt góðar møguleikar at fáa okkurt av teimum áhugaverdu loyvunum. Tað er neyvan hugsandi, at oljufeløg fara at bora í Íslandi tey mongu komandi árini, tí neyðugt verður við nógvum kanningum áðrenn.